# Lív og Nikolina vunnu fyrsta umfar

**Sjey luttakar kappaðust í vikuskiftinum um at koma í finaluna í kappingini um at gerast ársins songrødd**

SANGKAPPING
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Leygarkvøldið var fyrsta undanumfari í kappingini um at gerast ársins songrødd. Kappingin var á Kambsdali, og sjey luttakarar vóru. Upprunaliga var fullteknað, men nakrir luttakarar bóru seg undan í seinastu løtu orsaka av sjúku og nervum.

Nærum 500 fólk vóru til tiltakið, og fyrireikararnir siga, at kappingin gekk avbera væl. Tá ið avtornaði vóru tað tær báðar, Lív Næss og Nikolina Midjord úr Fuglafirði, sum vunnu við gamla slagarinum Hotel California hjá bólkinum Eagles. Nummar tvey gjørdist Ólavur Larsen, eisini úr Fuglafirði, og hon sang Feel hjá enska croonarinum Robbie Williams.

# Nú verður skotið Borðoyarmegin

**Klokkan trý seinnapartin í dag verður fyrsta skotið Borðoyarmegin latið av í sambandi við arbeiðið upp á nýggja Norðoyartunnilin**

NORÐOYARTUNNILIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Arbeiðið upp á nýggja Norðoyartunnilin gongur væl, og í dag verður so fyrsta skotið latið av Borðoyarmegin. Tað verður borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, ið skal lata fyrsta skotið av, og hetta verður klokkan trý seinnapartin í dag.



*Dávur Reinert Hansen, stjóri í Norðoyartunnlinum, sigur, at arbeiðið upp á nýggja tunnilin hevur gingið stak væl seinastu mánaðirnar*
savnsmynd

## Eitt vet framman fyri tíðarætlanina

Stjórin í p/f Norðoyartunnilinum, Dávur Reinert Hansen, sigur, at arbeiðið gongur væl. Byrjanin var annars eitt sindur drálandi, sigur Dávur Reinert Hansen, men síðani mánaðarskiftið januar/februar er ferð komin á, og í løtuni eru teir einar 30 metrar framman fyri tíðarætlanina, og tað svarar til okkurt um eina hálva viku, sigur stjórin í Norðoyartunnlinum.

Eftir at skotið er latið av, verður farið í høllina, sum Norðoyartunnilin leigar beint við Timburhandilin, har móttøka verður. Tá fara nevndarformaðurin í p/f Norðoyartunnlinum, Bergur í Garði, landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm og borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen at flyta fram røðu.




Vika 17, 2004
www.kaupthing.fo

# Ein rentuhækking komin nærri

Í farnu viku vórðu fleiri búskapartøl kunngjørd sum stiðjaðu sterku arbeiðsmarknaðarfrágreiðingina fyrr í mánaðinum. Smásølan í USA øktist meiri enn væntað, færri søktu um framhaldandi arbeiðsloysisstuðul, samstundis sum prísvøksturin í USA vaks. Bæði brúkaraálitið og vinnuálitið gjørdust hægri enn væntað. Hetta fekk donsku 2 og 10-ára lánsbrævarenturnar at hækka við ávíkavist 0,06 og 0,04%-stig. Hinvegin lækkaði prísurin á partabrøvum.

Partabrøv hækka vanliga av góðum búskapartølum, men óttin fyri hækkandi rentum og einum sterkari dollara, sum í farnu viku kostaði 6,22 DKK, og á hægsta stigi síðan byrjanini av des. 2003, fekk partabrøvini at falla í prísi.

Prísurin á partabrøvunum í finsku telefyritøkan Nokia fall heili 28,5%, í tveimum umførum, tvær tær seinastu vikurnar úr 17,35 til 12,4. Fyrstu fer í páskavikuni, tá kunngjørt varð, at inntøkan í fyrsta ársfjórðingi óvæntað var fallin. Síðan farnu viku, tá leiðslan metti, at úrslitið fyri annan ársfjórðing fór at vera vánaligari enn áður mett.

Í eini samrøðu fríggjadagin segði stjórin í Nokia, at orsøkin til ringa úrslitið kemst av, at teir ikki hava megnað at vunnið tey 40% av marknaðinum sum ætlað. Fyritøkan er framvegis fíggjarliga sterk og heldur framvegis fast um settu málini, sum stjórin væntar verða rokkin í fjórða ársfjórðingi.

Fyri at tryggja framhaldandi búskaparvøkstur í USA, er tað umráðandi at komandi arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin eisini kann ávísa, at nýggj arbeiðspláss verða stovnsett. Um ikki, kann hugsast, at ivi aftur verður sáddur um dygdina í amerikanska búskaparvøkstrinum. Men við rentugongdini í farnu viku, eru sannlíkindini fyri, at tjóðbankin setur rentuna upp fyrr enn áður væntað, vorðin størri. Mikudagin fer amerikanski tjóðbankastjórin, Alan Greenspan at halda røðu. Røðan hjá Greenspan fer væntandi at fáa eina størri ávirkan á lánsbrævamarknaðin og fram til mikudagin fer marknaðurin harumframt at vera merktur av forvæntningum til røðuna.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,51% | 0,06% |
| 5 ára lánsbræv | 3,59% | 0,06% |
| 10 ára lánsbræv | 4,28% | 0,04% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 261,7 | -1,4% |
| OMX, Svøriki | 715,1 | -0,8% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.760,4 | -0,7% |
| S&P 500, USA | 1.134,6 | -0,9% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 104,56 | -0,1% |
| Evru Lánsbrøv | 165,67 | -0,3% |
| Norrøn Partabrøv | 78,77 | -2,5% |
| Altjóða Vøkstur | 66,33 | -0,8% |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 617,40 | 0,1% |
| EUR | 744,42 | 0,0% |
| GBP | 1.117,83 | -1,4% |
| NOK | 89,88 | 1,5% |

Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.



# Norröna hevði risa-hall í fjør

**Hetlandski nevndarlimurin í Smyril Line, Morgan Goodlad, sigur í viðtalu við Shetland Times, at Norröna hevði eitt hall á góðar 30 mio. krónur í fjør. Formaðurin í nevndini í Smyril Line, Klæmint Weihe, hevur ongar viðmerkingar til metingarnar hjá Morgan Goodlad**

NORRÖNA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin*



*Ferðamannaskipið Norröna hevði eitt risahall í fjør. Hetlendski nevndarlimurin, Morgan Goodlad, sigur í viðtalu við Shetland Times, at hallið liggur um góðar 30 mio. krónur.*
Mynd: Jens Kr. Vang

Gita hevur verið óført um, hvussu fyrsta árið hjá nýggju Norrönu hevur hilnast. Tað er einki dulsmál, at inntøkurnar hjá Smyril Line av nýggju Norrönu ikki hava staðið mát við metingarnar, sum vóru gjørdar, áðrenn stásiliga ferðamannaskipið fór í sigling í fjør.

Herviliga ILA-sjúkan hevur gjørt sítt til, at fyrsta fíggjarárið ikki hevur hilnast eftir vild. 6. mei verður roknsskapurin fyri fíggjarárið 2003 almannakunngjørdur og tá fæst nærri at vita um fíggjarstøðuna hjá Smyril Line.

Nevndin í Smyril Line hevur verið rættiliga friðarlig um fíggjarstøðuna hjá Norrönu, men nú góðar 14 dagar fyri aðalfundinum hjá Smyril Line loysir hetlendski nevndarlimurin í Smyril Line, Morgan Goodlad, frá posabandinum.

## 30 mio. eftir reyv

Í viðtalu við hetlendska internetblaðið, Shetland Times, greiðir skrivstovustjórin hjá Shetland Council og nevndarlimurin í Smyril Line, Morgan Goodlad frá, at hallið hjá Norrønu í fjør er góðar 30 mio. krónur.

– Vit høvdu eitt hall á góð 3 mio. pund í fjør. Vit eru noyddir at fáa okkara tíðarætlan og tað fíggjarliga í rættlag. Vit hava fyrireikað okkum væl til summarsiglingina, og nú skulu vit bara kjakast um vetrarsiglingini, sigur Morgan Goodlad við Shetland Times.

## Javnvigar

Morgan Goodlad er, hóast stórt hall, rættiliga bjartskygdur um framtíðarvánirnar hjá Norrönu.

– Talið, sum kemur fram í greinini við Shetland Council er ein meting og ikki eitt endaliga úrslit. Eg kann kortini váttað, at talið fer at liggja um 30 mio. í halli í fjør. Vit stóðu okkum væl í summarsiglingini, men vetrarsiglingin hilnaðist illa, har serliga laksaútflutningurin kiksaði. Eg eri kortini sannførdur um, at vit venda gongdini, tí Norröna hevur góðar inntøkumøguleikar, sigur Morgan Goodlad við Sosialin mánamorgunin.

Hann leggur afturat, at í 2001 og 2002 hevði Norröna eitt yvirskot á góðar 30 mio. krónur tilsamans og hallið fyri 2003 javnvigar tískil við góðu úrslitini í 2001 og 2002.

## Kúrrir

Á Smyril Line vilja tey hvørki vátta ella avsanna tíðindini um stóra hallið í fjør. Formaðurin í nevndini í Smyril Line, Klæmint Weihe, sigur seg ikki hava nakra viðmerking.

– Eg havi onga viðmerking til hatta talið og eg kann bert vísa til aðalfundin, sum verður 6. mei. Tá fáa tit endaligu tølini fyri 2003, sigur Klæmint Weihe í stuttari viðmerking

# Rás 2 ger bingo

**Sjálvan flaggdagin byrjar eitt nýtt tiltak á Rás 2. Útvarpsstøðin fer nú at gera bingo hvønn sunnudag**

EYDNUSPÆL
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Tað er Bjarni Góðadal, sum stendur aftanfyri hugskotið at gera bingo á Rás 2.

– Hugskotið byrjaði sum leyst prát. Eg prátaði við Petur Jacobsen, stjóra á Rás 2, og hann var klárur beinanvegin, sigur Bjarni Góðadal, íverksetari.

Nýggja bingospælið er skipað soleiðis, at tað verður tvær ferðir full pláta at vinna.

– Mann vinnur fyrst eina rekkju, síðani eina fulla plátu. Og so vinnur mann aftur eina rekkju og aftur eina fulla plátu, sigur Bjarni Góðadal.

Bjarni metir, at inntøkumøguleikarnir eru góðir. Hann sigur, at um selt verður einar 100.000 plátur um árið, so skuldi tað givið nakað av peningi. Men teir ætla ikki at byrja so harðliga.

– Vit vilja heldur síggja tíðina an og byggja tað spakuliga upp, sigur Bjarni Góðadal.

Marknaðarføringin av nýggja bingospælinum verður ígjøgnum Rás 2 og Sosialin. Bjarni Góðadal metir, at verkætlanin hevur eitt gott grundarlag at byggja á.

– Fólk dáma væl at spæla bingo, so eg vænti, at tað fer at gangast væl, sigur Bjarni Góðadal.

Spælt verður hvønn sunnudag klokkan 17:00. Pláturnar kosta kr. 25, og tær verða seldar í teimum flestu sølubúðunum kring landið og á øllum posthúsunum. Fyrsta bingospælið á Rás 2 verður 25.apríl.



*– Fólk dáma væl at spæla bingo, so eg vænti, at tað fer at gangast væl. Tað sigur Bjarni Góðadal, sum hevur tikið stig til bingospæl á Rás 2, ið byrjar komandi sunnudag*
Mynd: Álvur Haraldsen